**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 117/2019: Uppskot til samtyktar um menning av føroyskari filmsvinnu**

Bjørt Samuelsen, løgtingsmaður hevur vegna Tjóðveldi lagt málið fram tann 6. mars 2020, og eftir 1. viðgerð tann 22. apríl 2020 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 12. og 19. mai 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Filmsfelagið, Filmshúsið, Stuðulsskipanina fyri film saman við landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum, Jenisi av Rana, og landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Bjørt Samuelsen, Henrik Old, Bjarni Hammer og Bjarni K. Petersen) hevur hesar viðmerkingar:

Føroysk filmsvinna og filmsframleiðsla hava ment seg nógv seinastu árini. Føroyar hava av álvara møguleikan at gerast eitt filmsland, har føroyskir filmar og útlendskir filmar – gjørdir í Føroyum við lutvíst føroyskari arbeiðsmegi – kunnu framleiðast til altjóða marknaðin. Har filmsframleiðsla, sum listagrein, hevur møguleika at mennast á høgum støði. Fyri at røkka hesum krevst ein vinnu- og mentanarpolitiskur vilji við greitt settum málum fyri føroyskan film.

Føroysk filmsvinna er nú á einum vegamóti. Neyðugt er at styrkja filmsgrunnin munandi og at skipa hann soleiðis, at hann bæði rúmar vaksandi framleiðslu av stuttfilmum og amatør- ella áhugafilmum av ymiskum slagi, men at rúm samstundis er fyri professionellum spælifilmum og sjónvarpsrøðum. Neyðugt er eisini at økja afturberingarskipanina munandi, tí tær 200.000 krónurnar røkka sera stutt. Kortini vísa royndirnar longu, at latna upphæddin gevur inntøkurnar fleirfalt aftur, tá ein framleiðari velur at framleiða film í Føroyum.

Umráðandi er at halda fast í og styrkja lunnarnar, sum lagdir eru undir menningina av føroyskum filmi, gjøgnum eitt nú filmsgrunnin, Filmshúsið og afturberingarskipanina fyri filmsframleiðslu í Føroyum.

Tað grør veruliga um gangandi fót í mun til filmsframleiðslu í Føroyum. Her mugu møguleikarnir loftast, so orkan verður at framleiða spælifilm og filmsrøðir í Føroyum, sum eisini kunnu seljast út í heim. Føroyar hava longu filmsframleiðarar á altjóða støði. Úti í heimi standa fleiri klár at gera film, ið væl kann framleiðast her. Vit eru tó í harðari kapping við onnur lond, sum hava skipanir, ið eggja filmsframleiðarum at velja teirra land til framleiðsluna, við øllum tí avleidda virksemi og størvum hetta kann skapa. Tí eiga vit at gera eina menningarætlan fyri víðari menningini av

føroyskum filmi og filmsvinnu. Undir hesum eina strategi fyri filmsframleiðslu, hvussu filmsvinnan kann skapa størv kring landið, hvussu fakligu førleikarnir innan film støðugt kunnu mennast, hvussu útbúgvingartilboð á høgum støði kann skipast, og hvussu ein málrættaður vinnu- og mentanarpolitikkur kann tryggja, at sett mál verða rokkin.

Ein fyritreyt fyri hesum er, at játtanin til filmsgrunn og afturberingarskipan verður hækkað til neyðugt støði.

Meirilutin tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Johan Dahl, Beinir Johannesen og Jákup Mikkelsen) hevur hesar viðmerkingar:
Tann føroyska filmsvinnan er í blóma. Nógvar stórar filmsverkætlanir eru framleiddar her á landi, og eru fleiri ávegis. Tað er gott fyri eitt samfelag, at vit hava eitt fjølbroytt vinnulív, har eisini tann skapandi vinnan hevur góð kor at virka undir, og møguleika fyri víðarimenning.

Filmsvinnan hevur nógv avleitt virksemi við sær, millum annað innan hotel- og matstovuvirksemi, tá verkætlanir verða gjørdar, og eisini kunnu verkætlanir marknaðarføra okkum sum land, og vera við til at skapa sambond innan allar vinnugreinar. Tískil er tað týdningarmikið, at vit halda á við at menna filmsvinnuna.

Tá politiska skipanin skal inn og vera við til at menna hesa vinnu, so metir minnilutin, at vit fyrst og fremst mugu hyggja at, hvussu tær skipanir, vit hava í dag, kunnu betrast og vera kappingarførar við grannalond okkara, so sum Ísland og Bretland, ið mugu sigast at vera kappingarneytar á økinum. Avvarðandi landsstýrismenn, ið umsita afturberingarskipanina og stuðulsskipanina, hava boðað vinnunevndini frá, at teir arbeiða við at styrkja hesar skipanir.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 2. juni 2020**

| | | |
|---|---|---|
| Bjørt Samuelsen<br>formaður | Johan Dahl<br>næstformaður | Bjarni Hammer |
| Henrik Old | Bjarni Kárason Petersen | Beinir Johannesen |
| | Jákup Mikkelsen | |